ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 12. mars 2010

# Spæla um fyrsta steypið í ár

**– Tað er gott at koma í gongd, og vit ætla at vinna, eru Fróði Benjaminsen og Súni Olsen samdir um, áðrenn HB og Víkingur sunnudagin møtast í Stórsteypadystinum**



Fróði Benjaminsen í HB og Súni Olsen í Víkingi eru tveir av spælarunum, sum skulu dystast í Stórsteypadystinum sunnudagin Mynd: Heðin Weihe/HB

einstistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Fjórða árið á rað byrjar fótbóltsárið við Stórsteypadystinum, sum er millum føroyameistarararnar og steypavinnararnar frá árinum fyri. Hesa ferð møtast HB og Víkingur í dystinum, sum Lions Club í Føroyum og Fótbóltssambandið skipa fyri í felag sunnudagin klokkan 15 í Gundadali.

Bæði lið hava verið darvað í fyrireikingunum til komandi kappingarárið, tí kavin hevur ligið so leingi, og tí er kærkomið bæði hjá HB og Víkingi at fáa spælt ein steypadyst, nú tað ikki er blivið til serliga nógvar venjingardystir.

– Tað hava ikki verið so nógvir dystir, so tí kenni eg ikki so nógv til, hvussu hini liðini eru fyri. Men tað er deiligt at koma í gongd aftur, og eg haldi, at vit eru væl fyri undan hesum dystinum, sum vit ætla okkum at vinna, sigur Fróði Benjaminsen, sum fyri einum ári síðani kundi taka ímóti Lions-steypinum, tá HB vann á EB/Streymi.

Súni Olsen ásannar somuleiðis, at tað heldur ikki hjá Víkingi er blivið til so nógvar dystir, sum ynskiligt hevði verið, men at teir kortini hava verið hugagóðir undir venjing, umframt at teir hava staðfest, at menn tykjast vera betri nú, enn hon var um somu tíð í fjør.

– Hetta er so tað fyrsta steypið, vit hava at spæla um, og vit eru øgiliga spentir. Vit skulu gjarna vinna henda dystin, so vit koma væl í gongd við hetta kappingarárið beinanvegin, sigur Súni Olsen.

Samstundis sum Stórsteypadysturin gevur ábendingar um, hvussu tey bæði toppliðini frá í fjør eru fyri, hevur hann eisini til endamáls at útvega pengar til eitt vælgerandi endamál, sum hesa ferð er felagsskapurin, KRIS.

– Tað er bara stuttligt, at vit eisini kunnu vera við til at stuðla einum vælgerandi endamáli upp á henda mátan, og eg haldi hetta vera eitt fínt tiltak, sigur Fróði Benjaminsen, sum fær undirtøku frá Súna Olsen:

– Vit vóna, at nógv fólk kemur at hyggja, so mest møguligt av pengum kann koma burturúr til tað góða endamálið, dysturin hevur.

# Landsliðið uttan høvuðsstuðul

**Sáttmálin við Atlantsflog gekk út, tá HM-undankappingin endaði í heyst, og enn er eingin nýggjur sáttmáli gjørdur fyri komandi EM-undankappingina. Samband er tó millum Fótbóltssambandið og Atlantsflog um framhaldandi samstarv**

einstistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Atlantsflog hevur síðani 1995 verið høvuðsstuðul hjá landsliðnum – viðhvørt sum einsamallur stuðul og viðhvørt saman við øðrum. Men síðsta avtalan um stuðulssamstarv gekk út, tá HM-undankappingin endaði í fjørheyst.

– Enn hava ikki verið nakrar ítøkiligar samráðingar um, hvussu vit gera frameftir. Men sjálvandi fara vit at tosa um, hvussu vit skulu gera, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi.

– Vit hava hava havt eitt fínt samstarv við Fótbóltssambandið. Tað er heldur eingin loyna, at fótbóltslandsliðið – meira enn nakar – hevur skapt stóran áhuga fyri Føroyum sum ferðamál, umframt at landsliðsarbeiðið øll hesi árini eisini hevur givið okkum nógvan flutning.



Atli Gregersen og hinir á fótbóltslandsliðnum hava í løtuni ongan høvuðsstuðul Mynd: Álvur Haraldsen

### Leita eftir øðrum

At talan enn ikki hevur verið um ítøkiligar samráðingar, hóast samband hevur verið millum Fótbóltssambandið og Atlantsflog, hevur nakað við lutakastið til EM-undankappingina at gera, tí Fótbóltssambandið vildi fegið síggja, um lutakastið lagaði seg soleiðis, at tað kanska økti um møguleikan fyri, at aðrir stuðlar eisini vildu spæla við.

– Vit hava havt onkran í kikaranum, men eg vil siga tað soleiðis, at eingin er heilt nær. Hinvegin vilja vit fegin halda fram við góða samstarvinum við Atlantsflog, so eg vænti, at okkurt kemur burturúr, tá vit fara at samráðast meira ítøkiliga enn higartil, sigur Virgar Hvidbro, aðalskrivari hjá Fótbóltssambandinum.

– Og longu nú sær út til, at Atlantsflog er inni í myndini í sambandi við komandi dystirnar hjá landsliðnum í EM-undankappingini, tí tá vit vóru í Beograd til samráðingar um dystarskránna, vístu øll londini áhuga fyri at brúka Atlantsflog, tá tey koma hendavegin at spæla. Einasta undantakið var Estland, sum ivaðist eitt sindur, tí har var okkurt við, at tey høvdu avtalu við sítt egna flogfelag.